# WATSON TIL HANN TAKAST



## Vit skulu ikki vera bangin

**GRINDADRÁP** Vit skulu ikki gera Paul Watson meiri dramatiskan og vandamiklari enn hann er, heldur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum

Áki Bertholdsen

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, stúrir ikki so illa fyri, at Paul Watson er so skaðiligur fyri okkara umdømi úti í heimi, sum nøkur tykjast at halda.

- Paul Watson er rættiliga lágt í metum ímillum umhvørvisfelagsskapir, tí hann er meiri yvirgangsmaður enn hann umhvørvisstríðsmaður. Av tí sama taka aðrir umhvørvsfelagsskapir hann ikki í álvara og tað er mest í Føroyum og í Japan, at nakað serligt hoyrist til hann.

Tí heldur landsstýrismaðurin eisini, at vit skulu ikki stúra ov illa fyri okkara altjóða umdømi fyri tað um Paul Watson kemur higar.

- Vit skulu ikki vera bangin fyri honum. Men sjálvandi skulu vit vera fyrivarin og kemur hann higar, hava vit eina uppgávu at kunna umheimin.

Hann leggur afturat, at vit hava verið undirdíkt í grindamótmælum í eini 25 ár, men tað hevur ikki havt avleiðingar av týdningi fyri okkara útflutning.

- Blóðugar myndir eru farnar um allan heimin í yvir 20 ár, men vit hava megnað at upplýst, so at skaðin hevur verið øgiliga avmarkaður.

- Vit hava fingið líka góðan, ella betri prís, fyri okkara fisk, enn onnur hava fingið.

So tað hjálpir at kunna og tað tað stríðið hava vit vunnið, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Løgreglan brynjar seg

**GRINDADRÁP** Løgreglan fer at halda eitt vakið eyga við Paul Watson, tá ið hann kemur til Føroyar. Men hann hevur eina bót at betala og hon skal avgreiðast tá ið hann kemur, sigur Peter Thaysen, politiovasti

Áki Bertholdsen

- Vit eru fullgreið yvir, at Paul Watson og Sea Shepherd ætla sær til Føroyar í summar.

Tað sigur Peter Thaysen, politiovasti.

- Og vit eru eisini til reiðar at taka ímóti honum, leggur hon afturat.

Hann sigur, at øll hava rætt til at vísa sína støðu til ávís mál.

Uppgávan hjá løgregluni er at tryggja, at øll fáa fríar træsur at vísa sína støðu.

- Og so leingi tey gera tað á lógligan hátt, eru tey vælkomin. Men bróta tey lógina í hesum sambandi, er tað eisini okkara uppgáva at steðga tí.

Politiovastin leggur afturat, at heldur Paul Watson ikki lógina, er løgreglan eisini útgjørd til at steðga tí.

- Vit kenna Paul Watson og vit vita, hvussu harðligur hann kann vera í síni framferð. Og eg kann vissa um, at vit hava fyrireikað okkum upp á tað, sum vit kunnu vænta okkum av honum.

Hann kemur ikki nærri inn á hvat og hvussu, men hann skoytir upp í, at røkkur manning og útgerð, sum er í Føroyum ikki til, hava tey møguleika at fáa styrk úr Danmark til at steðga Paul Watson.

Peter Thaysen sigur, at vit hava reglur fyri, hvussu vit skulu bera okkum at á sjónum, og tær reglarnar eru eisini galdandi í sambandi við grindadráp.

- Og brýtur Paul Watson tær reglarnar, er tað lógarbrot og so verður hann tikin, so at hann kann rættarsøkjast fyri síni lógarbrot.

**Skal betalast**

Men so var tað handan bótin, Paul Watson hevur hangandi yvir høvdinum?

Tað er pÚra rætt, at hann hevur fingið eina bót upp á 300.000 krónur, sum hann ikki hevur goldið og tað er sjálvandi eitt mál, sum skal avgreiðast.

- Tað eru ymsir praktiskir trupulleikar í hesum sambandi. Ein trupulleiki er, at bótin skal fyrst kunngerðast fyri honum. Tá ið hon er tað, eru ávísir mátar at avgreiða málið upp á.

Politiovastin sigur, at bótin er eitt mál, sum skal avgreiðast, tá ið hann kemur.

Men hvussu løgreglan ætlar at fara fram, vil hann ikki siga.

- Tað taka vit støðu til, tá ið hann kemur, sigur Peter Thaysen.

## Mugu ikki slaka

- Spurningurin um grindadráp er ikki ein spurningur um, hvat umhvørvisfelagsskapir halda um okkum, og so slett ikki, hvat ein sum Paul Watson heldur um okkum.

Tað heldur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum.

Hann sigur, at grindadráp er eina og aleina ein spurningur, sum vit sjálvi skulu taka støðu til. Og tað skulu vit gera út frá um tað er burðardygt ella ikki og um vit annars halda tað vera rætt.

- Og so er tað sjálvandi heilsufrøðiliga tilmælið um at grind er óhóskandi mannaføði tí tvøst og spik eru so illa dálkað.

Tað skulu vit taka í álvara, men har má hvør einstakur gera upp við seg sjálvum um hann ella hon vilja fylgja tilmælinum ella ikki.

- Vit skulu taka støðu til grindaráp alt eftir, hvat vit sjálvi halda vera rætt og ikki eftir, hvat onnur halda vera rætt, leggur hann afturat.

- Vit liva av havsins ríkidømi. Tað er ein rættur, vit skulu halda fast um og vit skulu ikki geva eftir fyri trýsti.

## Størri vandi enn Watson

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, heldur, at hóast onki kann útihýsast, er hann meiri sannførdur um, at spurningurin um burðardygga fiskivinnu er ein størri avbjóðing fyri okkum enn Paul Watson er.

Tað er onki, sum bendir á, at grindadrápið fer at beina fyri okkara útflutningi.

Tað hava vit lítið merkt til øll hesi árini og hvørki Noreg ella Ísland hava heldur havt trupulleikar av hvalaveiðini.

Hann vísir á, at umframt Sea Shepherd, vóru tað eisini IWC og Greenpeace, sum stríddust ímóti grindadrápi, men hesir felagsskapirnir hava báðir tikið seg aftur úr stríðnum ímóti grindadrápi, so nú er bara Paul Watson eftir.

- IWC fæst ikki við grind longur og Greenpeace leggur seg ikki út í grindadráp so leingi tað er burðardygt, og tað er okkara grindadráp.

Landsstýrismaðurin viðgongur, at heilsuvandin við at eta grind, kann vera eitt argument hjá umhvørvisfelagsskapinum.

- So er spurningurin um umhvørvisfelagsskapirnir lata standa til, so at dálkingin heldur fram, men at tað skulu vera føroyngar, sum skulu betala prísin, ella um teir royna at steðga dálkingini, sigur landsstýrismaðurin.